ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

16. august 2021
Mál: 21/15371-4
Tygara Skriv:
Viðgjørt: Birna Steingrímsdóttir

Nr. 52-008/2021

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um útreiðslur til rehabilitering á almannaøkinum, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Spurningar:

1. Hvussu stórar vórðu samlaðu útreiðslurnar til rehabilitering á almannaøkinum, t.v.s. til endurvenjing og endurmenning - í 2018, 2019, 2020 og játtan 2021?
2. Hvussu vórðu útreiðslurnar býttar á málbólkar ella slag av sjúkum hetta sama tíðarskeiðið?
3. Hvussu stóra játtan er ætlanin at seta av á fíggjarlógini til rehabilitering í 2022 og 2023?
4. Kann landsstýrismaðurin geva eina stutta frágreiðing um, hvussu innihaldið í samstarvinum millum almannaøkið og kommunurnar um rehabilitering er skipað?

Viðmerkingar:

Tað eru nógvir føroyingar, sum hava tørv á rehabilitering. Rehabilitering byggir á ta fortreyt, at talan er um viðgerð í longri tíðarskeið. Sjúkralegur í styttri tíðarskeið krevja ikki tað sama av avvarðandi, arbeiðsbyrða og familjulív - ein læknafaklig meting.

Rehabilitering fyrigongur bæði á heilsuøkinum og almannaøkinum, og tí hevur landsstýrismaðurin í heilsumálum fingið ein fyrispurning um sama evni.

Tað er trupult í løtuni neyvt at lýsa, hvør fíggjarlig orka verður brúkt ella er markað til rehabilitering í Føroyum, t.d. býtt á málbólkar og sjúkuslag.

Tað er altavgerandi at vita, hvør fíggjarlig orka verður brúkt upp á verandi skipanir, hvussu vit raðfesta avmarkaðu fíggjarligu orkuna og ikki minst, um tørvur er á at umraðfesta og umskipa rehabiliteringsøkið - við borgaranum í fokus. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 4. august 2021

Johan Dahl

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Svar:
Innleiðandi verður víst til svarið til fyrispurning nr. 52-139/2020, dagfest 17. mai 2021, har greitt varð frá, at **r**ehabilitering á almannaøkinum – endurmenning - fevnir um menning í breiðari merking við endamálinum, at viðkomandi borgari aftur fær eitt virkið lív, og við røttum umstøðum aftur megnar at klára seg sjálvan í størst møguligan mun. Stórur partur av virkisøkjunum hjá Almannaverkinum eru tískil fevnd av økinum rehabilitering. Eitt høvuðsendamál við løgtingslóg um almannatrygd og tænastur sbrt. § 1, stk. 1 er at menna og endurmenna.

Samanlagt hevði Almannaverkið 489 borgarar í einum endurmennandi átaki í 2020. Hesir vóru m.a. í einum arbeiðsbúgvingarátaki, fingu endurvenjing, búðu á einum bú- og viðgerðarstovni ella fingu hjálp frá Megna títt lív. Afturat tí, eru aðrar veitingar og tænastur, sum Almannaverkið metir eru týðandi fyri eina tilgongd at endurmenna ein borgara. Talan kann vera um at veita hjálpartól, onnur hjálparráð, endurgjald fyri inntøkumiss og meirútreiðslur, stuðulstænastu, fyribils uppihaldsveiting og heimaráðgeving fyri at nevna nøkur átøk, sum kunnu vera partur av bulinum í at endurmenna ein borgara.


Í roynd og veru er endamálið við nærum øllum virkseminum hjá Almannaverkinum endurmennandi. Fyri at kunna svara spurninginum so greitt sum gjørligt, er svarið avmarkað til tann partin av virkseminum hjá Almannaverkinum, sum seinastu árini hava verið nevnd endurmenning og endurvenjing. Á tann hátt fáa vit eina betri fatan av hvussu økið er raðfest politiskt. Tí verða fleiri av teimum økjunum, sum greitt varð frá í svarinum til fyrispurning um rehabilitering ikki tikin við her, s.s. útreiðslur til arbeiðsbúgving undir Arbeiðsfremjandi tiltøkum og aðrar uppihaldsveitingar, rakstrarútreiðslur á sambýlum o.a.

Til spurning nr. 1
Talvan niðanfyri vísir útreiðslur, sum hava verið játtaðar á fíggjarlógini til endurmenning og endurvenjing undir *høvuðskontu 12.21.1.12. Endurmenning* og til deildina Menning undir *høvuðskontu 12.21.1.12. Almannaverkið*. Harumframt verður viðlíkahaldsvenjing tikin við frá 2021 (nýggj tænasta) og útreiðslur til átakið "Megna títt lív" eru tiknar við.

Svar:	**R 2018**	**R 2019**	**R 2020**	**2021**
Endurmenning (Deildin menning í Almannaverkinum)	9.419	9.562	9.171	8.700
Endurvenjing	4.983	5.151	6.233	7.121
Viðlíkahaldsvenjing				2.000
Megna títt lív		950	3.219	4.500
Tilsamans	**14.402**	**15.663**	**18.623**	**22.321**

Í fíggjarlógini fyri 2021 eru 1,9 mió. kr. fluttar frá *høvuðskontu 12.21.1.12. Endurmenning* til deildina menning undir *høvuðskontu 12.21.1.12. Almannaverkið* og samtíðis varð navnið á høvuðskontuni broytt frá at kallast Endurmenning til Endur- og viðlíkahaldsvenjing.

Til spurning nr. 2
Útreiðslurnar verða ikki býttar á málbólkar ella slag av sjúkum. Almannaverkið hevur tó eina innanhýsis bólking á Endurvenjing, sí niðanfyri yvirlit frá juni 2021.



Upplýsast kann eisini, at málbólkurin, ið fær tænastu frá Megna títt lív, er borgarar við sálarsjúku. Onkur einstakur borgari hevur fleiri diagnosur, m.a. ADHD ella menningartarn.

Til spurning nr. 3
Farið er ikki undir fíggjarlógararbeiði fyri 2022 og 2023. Framskrivaðu játtanarkarmarnir fyri 2022-2026 eru grundaðir á galdandi lóggávu og verandi virksemisstig.

Sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur er heimild fyri at skipa fyri viðlíkahaldsvenjing frá september 2021. Mett verður, at tá viðlíkahaldsvenjingin er fult implementerað eigur játtanin at vera samanlagt 12 mió. kr. Á fíggjarlógini fyri 2021 eru 2 mió. kr. settar av til endamálið. Ætlanin er, at tænastan stig- og miðvíst verður útbygd, har játtan verður sett av sum frálíður.

Á fíggjarlógini fyri 2020 varð játtanin til endurvenjing hækkað við 1 mió. kr. og í 2021 við 0,6 mió. kr. afturat. Mett verður, at játtanin eigur at hækka við umleið 0,7 mió. kr. til at vera komin á tað støði at veita vælvirkandi tænastur í tráð við tilmæli um tænastupolitikk.

Til spurning nr. 4
Tað er avmarkað, hvussu nógv Almannaverkið og kommunurnar samstarva um endurmenning, serliga tí, at løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. hava eitt greitt býti við 67 ára aldur.

Havast skal í huga, at tað er ein ávísur fakligur munur á tí endurmenning, sum fólk undir 67 ár hava tørv á, og tí endurmenning, sum fólk yvir 67 ár hava tørv á. Almannaverkið og eldraøkini hava tí lagt seg eftir at hava fakkunnleika og fyriskipanir, sum samsvara teimum avbjóðingum, sum málbólkarnir hvør sær hava.

Almannaverkið hevur tó eitt ávíst samstarv við eldraøkini um at leiga venjingar hølir í økjum, har Almannaverkið ikki sjálvt hevur nøktandi hølir.

Tá frástøðan til arbeiðsstað hjá ergo- og fysioterapeutum hjá Almannaverkinum hevur verið ov stór, hevur Almannaverkið í nøkrum førum keypt tænasturnar frá kommununum.